

ikki fyri, at bæði Statoil og Føroyar hava gjørt ein góðan handil at fáa ExxonMobil við í leitingina við Føroyar. Nógv bendir nú á, at tað komandi mánaðirnar fer at vera meira virksemi í hølunum á Bryggjubakka.

*jan@sosialurin.fo*

# AP saman við oljurisum

– Tað er ikki hvønn dag, at man samstarvar við heimsins største oljufelag og tað er eisini sera gott fyri føroyska økið, at eitt felag sum ExxonMobil kemur inn og tað gevur eisini okkum betri mót uppá, at tað framvegis eru tey, sum trúgva uppá, at olja finst í føroysku undirgrundini. Hetta sigur stjórin í Atlantic Petroleum, Ben Arabo, sum fegnast um samstarvsavtaluna við amerikanska oljurisan.

- Nú hava vit bara eitt prosent í brunninum, men her verður talan um stórar strukturar, sum skulu borast og sum krevja stórar íløgur, so 1% er eitt fittur biti hjá einum felag sum Atlantic Petroleum sigur Ben Arabo og leggur aftrat, at aðrir brunnar, sum hava verið boraðir í hesum økinum, hava ligið um eina hálva milliard krónur, so parturin vil tá vera einar fimm milliónir kr.

Men hetta eru góð tíðindi fyri okkum, og vit gleða okkum til, at Brugdan Deep brunnurin nú verður boraður.

Ben Arabo sær hetta sum eitt týðandi vegamót í leitingini við Føroyar, at eitt so stórt felag sum ExxonMobil kemur inn í økið. Nógv feløg hava tikið seg út úr føroyska økinum, og tí er tað so týdningarmikið at eitt nýtt felag bindur seg til stórar ætlanir og arbeiði. Ben Arabo heldur tað vera eitt gott tekin, at ExxonMobil hevur keypt seg inn í trý loyvi tí ætlar man at satsa nakað her, so er greitt, at man keypir seg inn í fleiri øki.

Hann heldur eisini, at tá eitt so stórt felag sum ExxonMobil ger av at vera við í leitingini í Føroyum, so kann tað fáa onnur feløg at endurskoða sínar ætlanir og meta um Føroyaøkið av nýggjum.




*Á kortinum síggja vit loyvini hjá Statoil og hvar onnur feløg eru við.*

# Heimsins størsta oljufelag til Føroya

**HEIMSINS STØRSTA** ExxonMobil hevur keypt seg inn í trý loyvi hjá Statoil á Føroyaøkinum. Hetta eru einki minni enn stórtíðindi fyri oljutilgongdina í Føroyum - eisini í altjóða oljuhøpi. Atlantic Petroleum er eisini partur av samtakinum, sum fer at bora í summar.

Jan Müller

Tað er eingin loyna, at ta síðstu tíðina hava vit fyri tað mesta sæð oljufeløg fara úr Føroyum. Men við avtalu, sum Statoil hevur gjørt við ExxonMobil, kann sigast, at vend er komin í. Tað eru nevniliga tveir sera sterkir spælarar í oljuhøpi, sum nú eru farnir at samstarva á Føroyaøkinum. Statoil stendur á odda fyri tilsamans seks loyvum í Føroyum. Tað eru trý av hesum loyv-um, sum ExxonMobil nú hevur keypt partar av, í tveimum av loyvunum 50% og í einum 49%, nú Atlantic Petroleum eigur 1%. Statoil er so fyristøðufelag í øllum sínum loyvum og eigur 50% í hesum trimum loyvunum.

Áhugavert verður at síggja, hvat fer at koma burturúr hesum samstarvi. Eitt er tó givið, at hetta kemur at styrkja um oljutilgongdina í Føroyum.

Lítið man verða at ivast í, at Statoil her hevur gjørt ein góðan handil. Líkt er eisini til, at felagið hevur havt eina heildarætlan fyri økið í langa tíð, og fingið sær loyvini bíliga, fyri síðani at selt út til tess at minka um váðan, so hvørt sum borast skuldi.

## Fegnast

Í tíðindaskrivi sigur Rúni M. Hansen, stjóri hjá Statoil seg vera sera fegnan um at fáa ein so sterkan og royndan samstarvsfelaga á hesum avbjóðandi øki. Bæði ExxonMobil og Statoil hava drúgvar royndir við oljuleiting á tílíkum krevjandi leitingarleiðum. Hetta sundurbýti av loyvunum passar eisini væl inn í teirra heildarætlan um góða samanseting av ognum.

Ovasti leitingarstjórin hjá ExxonMobil, sigur í sama tíðindaskrivi, at ExxonMobil gleðir seg til samstarvið við Statoil, Atlantic Petroleum og føroysku myndugleikarnar um henda leitingarmøguleika. Hann sigur, at teir ætla at nýta teirra royndir og kunnleika til at leita eftir olju á føroyska landgrunninum við tí mest framkomnu tøknini og eftir trygdarreglum á hægsta stigi.

Tað kann av sonnum sigast, at tað eru tveir risar, sum nú skulu samstarva á Føroyaøkinum. Statoil hevur eitt marknaðarvirði uppá 450 milliardir danskar krónur, og ExxonMobil hevur eitt marknaðarvirði á umleið 450 milliardir dollarar. Til sammetingar kann sigast, at danska fyritøkan A.P Møller Mærsk hevur eitt marknaðarvirði á 230 millardir danskar krónur

Vert er eisini at leggja merki til, at Atlantic Petroleum eigur 1% í loyvi 006, og fær sostatt Statoil og ExxonMobil sum samstarvsfelagar. Eisini ein áhugaverd og spennandi tilgongd hjá tí føroyska oljufelagnum.

*jan@sosialurin.fo*